G!



# Teitur 200 desibel

G!
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Fitti Teitur er ikki longur líka fittur, aftaná at punkararnir úr 200 fóru á pallin, og punkaðu tey bæði seinastu løgini hjá Teituri fríggjakvøldið. Men hóast Teitur ongantíð aftur verður líka fittur í eygunum á teimum nógvu áhoyrarunum, sum høvdu leitað sær oman á sandin, so var hetta ein fantastisk tónleikauppliving.

Tvey av størstu føroysku tónleikanøvnunum á palli saman. Ljóðmyndin, sum varð skapt í løgunum "Last kid on the playground" og "Hitchhiker" var í besta lagi ógvuslig og í ringasta lagi devulsk. Fólk vistu ikki, um tey skuldu hoppa ella bara standa gapa í sjokk.Við tveimum trummuleikarum og tveimum el-gittarum buldraðu og brakaðu teir 200 ferð so hart, sum Teitur plagar.

## Fyrsta stóra navn

Teitur var fyrsta ordiliga stóra navnið á pallin á G!, og heilt fitt av fólki var á konsertini, sum var ein ferð gjøgnum nýtt og gott gamalt hjá einum av frægastu føroysku lagasmiðunum.

Teitur er skjótt til reiðar at fara í upptøkuhølið aftur, og hetta merkti framførsluna, fleiri nýggj løg vóru á skránni, og tey vóru flest øll góð. Umframt tey bæði løgini, sum 200 tolkaðu, var eisini frálíka "Waiting for Mars to come out" eitt satt hæddarpunkt. Undantakið var "All my mistakes become masterpieces", tittulin varð mótprógvaður í lagnum, sum var tað ringasta á spæliskránni.

Tolkingin hjá Teituri av "Great balls of fire" hevur seinsta árið verið ein fastur partur av hansara spæliskrá, og var tað aftur fríggjakvøldið. Hetta er ein frálík tolking, sum er sera egin.

Løg sum "Regnið", "I was just thinking", "Poetry and Aeroplanes", "Sleeping with the lights on", "To meet you" og besta lag í Føroyum "Josephine" fingu stóran part av áhoyrarunum at syngja við. Teitur er vorðin fólkaogn í Føroyum.

# Hjørdis og genturnar fyri børn í øllum aldri



G!
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Hjørdis og genturnar munnu vera ein tann fólkakærasti bólkurin í Føroyum. Øll duga at syngja við í næstan øllum løgunum. Men bólkurin hevur ongantíð hildið eina konsert. Altso ikki fyrr enn leygardagin. Spæliplássið á G! gjørdist tann upplagdi karmurin og børn og fyrrverandi børn savnaðust í stórum tali at lurta.

Genturnar vóru vorðnar konir, men sungu enn líka hjartaliga.Tær løgdu fyri við sanginum um indianarabørnini, og høvdu røttu koreografiðina aftur við. Hetta var herligt, og spæliplássið sang við. "Mala hendan veg" var somuleiðis sungin við røttu koreografiini. Spæliskráin var stúgvandi full av kendum sangum: "Dukkan fía", "Í barnagarði", "Rivnar gularøtur", "Tú skalt klappa" og "Eg vil telja stjørnur" fyri at nevna narkrar teirra.

Hjørdis spældi gittar og Maria Guttesen ljómborð, afturat teimum var ein stórur bólkur av parykkílætnum tónleikarum, sum stuðlaðu undir løgini. Hæddarpunktið á konsertini var, tá Maria Guttesen sang eina ótrúliga vakra útgávu av "Dukka mín er blá". Maria hevur fingist nógv við tónleik, og klárar seg væl í danska tónleikaídnaðinum, men ongantíð havi eg hoyrt Mariu sungið so vakurt, sum í hesum lagnum.

Fyrsta konsertin hjá Hjørdis og gentunum gekk væl, so vónandi verður hett ikki tann síðsta.



# Páll Fann Páll á G!

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Eldru gøtukonurnar undir liðini á mær, flentu sum smágentir at nøkrum av teimum fúlaru tekstunum hjá Páll Finnur Páll. Men størsti parturin av áhoyrarunum livdu bara við í tónleikinum, og fingu eina góða konsertupplivíng.

Páll Finnur Páll eiga í "Forelskaður sjónleikari" mest spælda lag seinastu tvey árini, og fyrra fløgan hjá bólkinum hevur selt væl. Harumframt er bólkurin tiltikin fyri stórslignar og góðar konsertir. Men hóast hetta varð bólkurin aftur í ár settur at spæla á lítla pallinum á Spæliplássinum á G!, hetta var eitt mistak í fjør, og tað var tað aftur í ár. Hetta er ein av teimum bólkunum, sum klárar at bera eina kvøldframførslu á stóra pallinum.

Konsertin var frálík, fólk livdi við, og bólkurin hevði áhoyrarafjøldina í sínum lógva. Løgini hjá teimum eru so áhoyraravinarlig, at sjálvt við tekstum, sum fáa sjálvt tey harðastu at kenna seg illa við, gongur tað. Páll Finnur Páll løgdu G! fyri sínar føtur annað árið á rað.

Nýggju løgini ljóðaðu heilt øðiliga spennandi, og vit kunnu bert gleða okkum til, at fløgan kemur.